# LØGTINGSLÓG NR. 64 FRÁ 26. MAI 2011 UM MANNTAL Í 2011

**Løgtingslóg nr. 64 frá 26.05.2011**

Nr. 64 26. mai 2011

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Manntal skal haldast í Føroyum á heysti 2011.
*Stk. 2.* Endamálið er at gera eina neyva hagtalslýsing av føroyska samfelagnum.
*Stk. 3.* Manntal er skipað sum ein verkætlan undir Hagstovu Føroya, sum hevur ábyrgd av verkætlanini.

**§ 2.** Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð, nær og hvussu manntal verður hildið.

*Spurnablað*

**§ 3.** Hvørt húski og einstaklingur í Føroyum fær eitt spurnablað at svara. Í spurnablaðnum verður spurt um hesi evni:

1) Navn, kyn, aldur og p-tal.
2) Starv, útbúgving, vinna og arbeiði, arbeiðsumstøður og knýti til arbeiðsmarknaðin.
3) Uppihald í øðrum londum.
4) Trúgv og tilknýti til kristnar kirkur, fríkirkjur og samkomubólkar.
5) Almenna heilsustøðu, avmarking í dagligum virki orsakað av sjúku ella breki.
6) Ríkisborgaraskap, tjóðskap, føðistað, mál.
7) Bústaðir, slag av bústaði, lýsing av býli.
8) Lýsing av liviumstøðum í húskjunum og samansetingin av húskinum teljidagin.
9) Borgarastøðu, familjustøðu, hjúnalag, parlag, børn, foreldur, systkin.

*Stk. 2.* Felagsbýli fáa serligt spurnablað, har spurt verður um hesi evni:

1) Navn og p-tal hjá búfólkunum.
2) Slag av felagsbýli, lýsing av felagsbýli.
3) Tal á fólkum, sum gistu í felagsbýlinum teljináttina.

*Stk. 3.* Øll, sum búgva í Føroyum, hava skyldu at svara spurnablaðnum, men tað er sjálvboðið at svara spurningum sambært stk. 1, nr. 4. Avvarðandi, verji ella onnur svara fyri tey, sum ikki sjálvi eru før fyri at svara spurningunum.

*At góðkenna teljarar*

**§ 4.** Góðkendir teljarar verða brúktir at fremja manntalið.
*Stk. 2.* Hagstova Føroya góðkennir teljarar og útskrivar hesum váttan um góðkenning.

Treytin at verða góðkendur sum teljari er, at viðkomandi er myndugur og verður mettur egnaður at vera teljari eftir neyðuga frálæru og uppvenjing, serliga í heimildum, rættindum og skyldum hjá ávíkavist myndugleikum og borgarum, eisini rættindi sambært mannarættindum og altjóða sáttmálum.

*Stk. 3.* Tulkar og onnur hjálparfólk í manntalinum skulu hava somu góðkenning.

*Stk. 4.* Góðkendur teljari hevur sambært leiðbeiningum:

1) Heimild at koma til dyrnar hjá privatum og á øðrum støðum, har fólk búgva ella uppihalda sær.
2) Heimild at biðja fólk svara upp á teir spurningar, sum eru í spurnarblaðnum.

*Stk. 5.* Teljari skal altíð vísa góðkenningarváttan sína í samskifti sambært stk. 4 og eftir umbøn.

*Stk. 6.* Hagstova Føroya skal fráboðað alment, hvør er góðkendur sum teljari.

**§ 5.** Góðkendir teljarar og onnur hjálparfólk í manntalinum hava tagnarskyldu um viðurskifti um einstaklingar, húski, býli, feløg, fyritøkur og stovnar, sum tey í starvi sínum fáa kunnleika um, bæði meðan tey arbeiða fyri Hagstovu Føroya og aftaná, at tey eru farin úr arbeiðnum. Teljari og onnur hjálparfólk skulu skrivliga vátta, at tey hava kunnað seg við ásetingarnar um tagnarskyldu og viðkomandi heimildir, rættindi og skyldur.

*Nýtsla av upplýsingum fingnar í manntalinum*

**§ 6.** Hagstova Føroya hevur ábyrgdina av, at hagtølini frá manntalinum verða tøk hjá øllum.

*Stk. 2.* Arbeiði við úrslitinum av manntalinum fylgir teimum lógum og reglum, sum Hagstova Føroya hevur skyldu at halda.

*Stk. 3.* Upplýsingar, sum Hagstova Føroya fær á manntalinum kunnu einans latast øðrum sum hagtøl, har eingin einstaklingur, býli ella húski kunnu kennast aftur.

**§ 7.** Upplýsingarnar á manntalinum eru ogn hjá landinum, og Hagstova Føroya hevur landsins vegna ábyrgdina av, at spurnabløðini eru í tryggari varðveitslu, til viðgerðin er liðug.

*Stk. 2.* Aftaná, at upplýsingarnar frá manntalinum eru talgildar, verða spurnabløðini latin Landsskjalasavninum í varðveitslu. Atgeingið er vart sambært ásetingum í lóg um Føroya Landsskjalasavn.

*Revsing, gildiskoma o.a.*

**§ 8.** Er ikki harðari revsing uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður við bót revsaður tann, sum brýtur tagnarskylduna í § 5.

*Stk. 2.* Tann, sum brýtur grein 3, stk 3, við vilja ella av grovum ósketni, kann verða revsaður við bót.

*Stk. 3.* Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

*Stk. 4.* Í reglum, ið verða givnar sambært lógini, kann revsing verða ásett við bót fyri brot á reglurnar ella treytir, ið verða givnar sambært reglunum.

**§ 9.** Landskassin rindar útreiðslurnar fyri manntalið.

**§ 10.** Hendan løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**

løgmaður

Lm. nr. 115/2010